# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*27. juli bleiv hesin fitti drongur føddur, ið er her á myndini við stórabeiggja Tóka. Lítlibeiggin vigaði 3900 gr, og var 56 cm langur. Foreldrini eita Marin Strøm og Janus Helgi Lærsson, og búgva í Keypmannahavn.*



*1. august fekk Heini Poulsen, Tórshavn, eina lítlasystir, hon var 56 cm long og vigaði 4150 gr.*



*1. august fingu Budsara I. Johansen og Rógvi N. Johansen, Århus ein son. Hann var føddur á Skejby Universitets Sjúkrahúsið. Hann vigaði 3550 gram og var 52 cm. langur og hann eitur Dino.*

1. august fingu Jensa Sirdal og Kartin Sivertsen, Klaksvík, ein son. Hann var 54,5 cm. langur og vigaði 4350 gr.

3. august fingu Jóna Midjord og Thordar Garðshamar, Haslev, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

3. august fingu Eyðbrit tog Sørin Birgir Sørensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

5. august fingu Jensia og Leon Kjærbæk, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 5000 gr.

6. august fingu Doretha og Karstin Joensen, Runavík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

7. august fingu Asta Østerø og Eyðun Thorgeirsson, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3200 gr.

8. august fingu Bjørtfríð Magnussen og Hallur Stakksund, Sandnes, Norra, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4100 gr.

9. august fingu Sigga og Jón Sigurð Gleðisheygg, Norðskála, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3500 gr. Systranar eita Eydna og Rebekka.

10. august fingu Annika Rasmussen og Elmar Hansen, Kambsdalur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3620 gr.

# Til ommu á hundrað ára degnum

Góða omma.

Hundrað ár. Tað er so leingi, at eg dugi ikki at skilja tað. Ein heil øld. Og ein sera kollveltandi øld, har framstig og nýggjar uppfinningar hava floymt inn yvir heimin alla tíðina.

Eg minnist, tá eg var yngri, og hevði fingið til heimauppgávu at spyrja foreldur og ommur og abbar, hvør størsta kollveltingin í teirra lívi var. Í dag minnist eg bara eitt svar, og tað er títt. Tú svaraði: "tá elektrisitetið kom".

Eg havi ótrúliga ilt við at ímynda mær heimin uttan elektrisitet. Og eg veit, at tað eru mong við mær. Vit sóu jú rokið á ólavsøku. Tá legðist alt landið lamið, tí eingin streymur var í nakrar tímar.

Og nú dugi eg eisini at síggja alt stríðið, tú hevur havt sum bóndadóttir á Trøllanesi áðrenn hesa vælsignaðu uppfinning.

Mestsum allur dagurin man vera farin við at arbeiða fyri føðina, bókstaviliga talað. At fleyga, taka egg, røkta seyð og neyt og fiska. Og ikki at tosa um alt upptakið, tá fongurin var komin í hús. Alt við hond og við vatni úr mataránni. Fyri at hita vatnið mátti torv til, og at skera og turka torvið var jú eisini eisini stórarbeiði í sjálvum sær. Tað snúði seg ikki um at liva, men at yvirliva.

Eitt stríggið lív við nógvum fólki at taka sær av, og lítið av tíð til teg sjálva.

Minnist, at eg var ikki sørt øvundsjúk, tá tú greiddi frá um tína skúlagongd. Lærarin, sum hevði alla oynna, var bert í bygdini fjórðu hvørja viku. Hetta var, áðrenn nakar tunnil yvirhøvur hevði verið uppá tal, og tí var skúlagongdin eisini treytað av veðrinum. Um Skorin ikki var gangandi, varð undirvísingin av ongum ta vikuna, og tit máttu bíða tríggjar vikur afturat, inntil tykkara tørn aftur kom.

Í dag eri eg greið um, at skúlaleysa tíðin als ikki hevur verið tað bera spæl hjá tykkum, men at tit vóru noydd at taka tykkara stóra part av gerandisstríðnum.

Hóast bóndadóttir á Trøllanesi, vildi tú út at læra og síggja stóru verð, og helt leiðina til Kongens Kjøbinhavn. Øllum longdist at frætta, og tú kundi greiða teimum herheima frá, hvussu verðin sá út.

Í dag verður Keypmannahavn nærum ikki roknað við í stóru verð, tí hvørt mansbarn í Føroyum man hava verið har. Bert 2 tímar við flúgvara, so er ferðin liðug.

Tá tú vart fødd, var patent framvegis ikki tikið uppá fyrsta flogfarið.



*Omma eigur 12 langommubørn. Løgið at hugsa sær, at hennara langommur og langabbar livdu samstundis sum Nólsoyar Páll. Gud viti hvussu samfelagið fer at síggja út, tá nýggjasta sprotini á ættartrænum sjálvi fáa langommu- og langabbabørn. Omma kann bert staðfesta, at 100 ár ganga ógvuliga skjótt*

### Omma og Buffalo Bill

Tey siga, at "om hundrede år er alting glemt". Fyri ein stóran part er tað eisini so. Men av og á eru nøkur fólk, ið liva so leingi, at tað, ið vit onnur bert kenna úr søgubókunum, kunnu tey greiða frá av egnum royndum. Og tú ert so sanniliga ein teirra, ið dugir at greiða frá.

100 ár. Tað er setir alt í perspektiv, tá vit hugsa um, at søguligir persónar, ið nú næstan verða mettir at vera skrønir, tí tað er so langt síðani, at teir hava livað, í veruleikanum hava verið uppi á døgum í tíni tíð.

Tá tú vart fødd var "kovboy' og indianarar" ikki eitt spæl, men ein kaldur og barbariskur veruleiki. Tú hevur livað samstundis sum Buffalo Bill, ið var ein tann kendasti kovboy'arin, og Geronimo, ið telist millum kendastu indianarahøvdingar.

Tú vart fødd, áðrenn boarakríggið í Afrika enn var hæsað av.

Tú ert javngomul við seinasta keisaran í Kina, sum í fleiri ár varð fjaldur í forbodna býnum í Peking, áðrenn hann varð noyddur úr landinum.

Tá tú vart seks ára gomul, og stóra fólkaflytingin undan neyðini í Evropa til lovaða landið Amerika var uppá sítt hægsta, rendi Titanic á eitt ísfjall og sakk.

Tú hevur livað samstundis sum Florence Nightengale, Leo Tolstoy, Jack the Ripper, Mao, Edvard Grieg og Claude Monét.

Tá tú vart fødd, var Norðpólurin eitt stað, har fólk bert droymdu um at sleppa. Eingin hevði tá verið har.

Tú hevur livað, áðrenn Tom og Jerry undirhildu børnum. Áðrenn til bar at senda luftpost millum lond. Áðrenn snarlásið avloysti knapparnar. Áðrenn samlibandið.

Tá tú vart ung, var ferðin til Havnar tung og tók ofta fleiri dagar. Nú kemur tú sitandi í bili allan vegin av Trøllanesi til Havnar.

Tá tú vart fødd, kendi eingin til neyðkallið SOS.

Tá tú vart fødd, var meturskipanin framvegis ikki tikin í nýtslu í norðanlondum. Tá varð bert roknað í favnum, fótum og tummum.

Góða omma.

Hóast tú nú ert vorðin eina øld, og tú viðhvørt blandar ættarlið saman, so minnist tú okkum øll, tá vit siga hvørji vit eru. Og tá tú blandar, dugir tú so deiliga væl at flenna at tær sjálvari.

Tey veiku hava altíð staðið tær nær –og gera tað framvegis. Tað merki eg nú, tí hóast tú av og á blandar mongu eftirkomararnar saman, so minnist tú altíð til at spyrja um, hvussu lítlibeiggin man hava tað. Og tú ert veruliga áhugað í at frætta. Tú hevur ikki altíð sjálv havt tað lætt, men hevur so mangan sagt, at tað hjálpir at tosa við Várharra.

Góða omma, tú ert eitt satt konubrot.

Hjartaliga tillukku,

**Eydna**

## Dagarnir um vikuskiftið

**12. august. Klara.** Deyð 1253. Var av aðalsætt úr Assasi. Fór upp í fylgið hjá hinum heilaga Fransi, og eggjað av honum grundlegði hon eitt nunnukleystur og skipaði eina nunnuskipan, klarissurnar nevndar.

Navnið er latínskt, hin kenda ella skæra

**13. august. Hippolytos.** Deyður umleið 235. Helst ein grikki, sum gjørdist ein av teimum best kendu kristnu rithøvundunum í Róm í 3. øld. Hann var tikin av døgum við at verða slitin millum hestar, sum navn hansara sipar til.

Rasmus Rasmussen (á Háskúlanum) føddur 1871

**14. august. Eusebius.** Fleiri halgimenn at navni Eusebius eru knýtt at degnum 14. august